# og rekur Haraship í Danmark

slagi. Reiðaríir og feløg kunnu antin velja síni fólk til leys størv – ella leiga arbeiðsmegina frá felagnum. Talan kann bæði vera um einstøk størv, sum reiðaríir leita eftir – ella heilar skipsmanningar. Haraship syrgir fyri, at reiðaríir fáa tað, tey leita eftir.

– Tey 7.000 fólkini, sum vit hava í databasanum, eru í einum sonevndum innara ringi og einum ytra ringi, harav tey mest áhugaverdu fólkini verða vald í innara ringin.

Gilli sigur, at Haraship syrgir fyri at hava eitt persónligt samband við øll, sum eru í innara ringinum, soleiðis at felagið kann tryggja sær, at hetta eru tey røttu fólkini við rætta førleikanum, sum verða send umborð á einstøku skipini.

– Hvørja ferð, ein maður fer í arbeiði úr innara ringinum, verður enn ein maður úr ytra ringinum boðsendur til samrøðu, sigur hann.

Gilli sigur, at tann parturin av felagnum, sum eitur Crew Management, ikki bert sendir fólk umborð á skip, men eisini á stovnar, feløg, virkir og undirvísingarstovnar.

– Eitt nú er Skiparaskúlin í Grønlandi ein av okkara føstu kundum, tá ið ræður um at útvega fólk við røttu førleikunum.

Hann vísir á, at Haraship soleiðis hevur sent fimm navigatørar og maskinmeistarar til Grønlands.



*Technical Management fevnir um arbeiðsumhvørvi, vernd av heilsu og orkusparing. - Her eru vit einaumboð í Skandinaviu av nýggjastu tøkniligu menningini innan umhvørvisábyrgd, tá ið ræður um skipsmotorar við atliti til dálking og orkusparing, sigur Gilli Haraldson*

## Technical Management

Í øðrum lagi er talan um Technical Management, sum fevnir um arbeiðsumhvørvi, vernd av heilsu og orkusparing.

– Her eru vit einaumboð í Skandinaviu av nýggjastu tøkniligu menningini innan umhvørvisábyrgd, tá ið ræður um skipsmotorar við atliti til dálking og orkusparing.

Gilli sigur, at skipanin, sum felagið umboðar, kann spara motoroljunýtsluna eini 30-50%, samstundis sum skipanin fyribyrgir, at eitrandi olju-og gassdampur kemur úr maskinrúminum.

– Tá ið ein motorur gongur við yvirtrýsti í krumptapshúsanum, fer gass út í maskinrúmið og haðani upp til apeteringina. Avleiðingin er, at heilsuvandin økist, og hetta gongur á ymiskan hátt út yvir manningarnar.

Hann sigur, at við at venda trýstinum í motorinum frá yvirtrýsti til undirtrýst, verða luftbornu olju- og sótbitlarnir verandi inni í motorinum, har gassið eisini verður brent, samstundis sum motorurin brennir minni smyrjolju.

– Ein frágreiðing, sum er gjørd á universiteti í Íslandi, staðfestir, at menn, sum dagliga starvast í maskinrúmi, hava høvuðspínu, bróstpínu, eru troyttir og doyggja oftari enn miðal av krabbameini.

Gilli sigur, at tað er eisini prógvað, at hesir tregar halda uppat hjá teimum flestu, um oljudampurin verður fingin burtur.

– Jú, meira ein motorur er slitin – jú, meira dálkar hann, tí trýstið í krumtapshúsanum verður størri, samstundis nýtslan av smyrjolju veksur. Oljan verður trýst upp og framvið stempulringunum til brennirúmið og fer haðani við útstoytsgassinum sum sót og oljubitlar.

Loysnin uppá hesar trupulleikar, sigur Gilli er sonevnda OilGasSep-skipanin, sum á ein einfaldan og lættan hátt kann byrgja uppfyri hesum trupulleikum.

– Ein onnur vøra, sum eisini er við í loysnini, er FuelMag, sum ger, at motorurin fær reina olju – uttan mikrobur. Saman við OilGasSep-skipanini verður motorurin nú reinur, og reiðaríið sparir bæði motorolju og viðlíkahald, samstundis sum arbeiðsumhvørvið verður nógv betur. At enda er talan um Premaberg, sum førir fríska havluft niður í maskinrúmið og til apeteringina, sigur Gilli. Ein íløga í OilGasSep, FuelMag og Premaberg kann vinnast innaftur eftir einum ári, samstundis sum arbeiðsumhvørvið verður betur, manningin verður frískari og hevur færri sjúkradagar.

## Triðja beinið

Í triðja lagi hevur Haraship eina arbeiðsávísing, har langtíðararbeiðsleys og fólk, sum av ymiskum orsøkum hava trupult við at fáa arbeiði, kunnu fáa ráðgeving og eitt nú luttaka á skeiðum – við tí endamáli at sleppa útaftur á arbeiðsmarknaðin.

– Hetta er ein altjóða arbeiðsávísing fyri eitt nú fiskimenn og sjófólk annars, har vit samstarva við arbeiðsávísingar, kommunur og arbeiðsloysiskassar. Hvør einstakar persónur í skipanini verður roknaður sum okkara egni starvsfelagi.

Gilli vísir á, at við sambondum, ráðgeving, skeiðvirksemi og ymiskum projektum, ráðgevur og mennir Haraship í samstarvi við Skagen Skipperskole og Martec hesi langtíðar arbeiðsleysu soleiðis, at tey ikki longur søkja um arbeiði, men harafturímóti bjóða út sín kunnleika og dugnaskap á arbeiðsmarknaðinum.

– Hava fólk aðrar trupulleikar, eitt nú eru orðblind, hava ringt sjálvsálit, eru óttafull ella fongd við misnýtslu, samstarva vit við sálarfrøðingar um støðuna, sigur hann.



*Donsk bløð nevna Gilla Haraldsen "en 21 årig komet indenfor maritim management". Og lagt verður aftrat um fyritøku hansara: "Ungt firma í Fredrikshavn på verdenskortet med søforhyring, maritimt arbejdsmiljø og maritim nyhedsformidling"*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Haraship News

Í fjórða og seinasta lagi fæst felagið eisini við kunning og tíðindi á internetinum, har felagið eitt nú hevur "Tær Bláu Síðurnar", sum er ein kunningar portalur á internetinum og "Søfarts Forum", sum er ein tíðindakelda og upplýsingarsíða hjá danskari og útlendskari sjóvinnu – og at enda hevur felagið eisini "Fisker Forum".

– "Det Maretime Danmark", sum kann vitjast á www.detmaretimedanmark.dk, er stovnað sum eitt "vindeyga" fyri donsk virkir, sum leita eftir viðskiftafólkum í útlandinum. Á hesi síðuni kemst eisini inn á hinar nevndu adressurnar, sigur Gilli.

Haraship tekur eisini aktivt lut í menningini av arbeiðsplássum í Fredrikshavn við tilknýti til sjóvinnuna.

– Hetta er eitt fjølbroytt felag við dugnaligum starvsfólkum, sum hava stóran kunnleika til alt, sum hevur við sjógvin og sjóvinnu at gera, sigur 21 ára gamli, Gilli Haraldsen, at enda.